tíðindablaðið
# sosialurin
Telefon 11820 Telefax 14720

Einasta blaðið
5 ferðir
um vikuna

Tíðindi, lýsingar, sjónarmið, orðaskifti, myndir – bert ein partur av tí, tú finnur í blaðnum...

## veðrið

**Hátrýst, 1025 hPa, yvir vestara Ruslandi og hátrýstryggurin haðan til Miðevropa. 1020 hPa, hava seg norðureftir. Lágtrýst, 970 hPa, vestan fyri bretsku oyggjarnar rekur norðuryvir og lýtt lufttrák verður móti Føroyum av landsynningi og suðri. Brúgvalág við regni yvir bretsku oyggjunum og leiðunum norðan fyri Føroyar reka norðureftir og næstu dagarnar reka fleiri djúp lágtrýst undan Vesturírlandi til leiðirnar í útsynning úr Íslandi.**

**Leygardagin, sunnudagin, mánadagin, týsdagin & mikudagin**



**Einamest millum strúk í vindi og skrið, 13–18 m/s, frá sunnudegnum í skiftum kanska upp í hvassan storm, 25 m/s, alsamt lágt, einamest av landsynningi, áðrigið, regn í skiftum ella æl-ingur og bert tøluligt ella vánaligt sýni. Hitin alt tíðarskeiðið millum 5 og 10 stig.**

## óli teknar

ÓP

© 1995 Sosialurin/Óli Petersen

### *Føroyingar í olju*




**Felagið DANOP kannar í løtuni hvat føroyingar kunnu brúkast til innan oljuvinnuna**

# Ikki neyðugt at leika so í

*- Tað er eingin vandi á ferð, fyri tað um Teistin er niðurslitin, sigur Tummas Arabo, stjóri á Strandferðsluni*

Hóskvøldið bar útvarpið tey tíðindini, at strandferðsluskipið Teistin var við at detta sundur, og sama mynd varð brúkt í samrøðuni við Sámal Pætur í Grund landsstýrismann, í útvarpinum fríggjamorgunin.

Hetta var Tummas Arabo, strandferðslustjóri, ikki sørt argur um.

Tað er ikki neyðugt at leika so í. Hatta er at gera gølu burtur úr ongum. Tað er jú einki nýtt, at øll strandfaraskipini eru gomul og niðurslitin og hava sín ellisbrek. Tað er bara so. Eingin vandi er á nakran hátt á ferð, tí tryggdin er í lagi á Teistanum sum á hinum skipunum, sigur Tummas Arabo.

Hvussu víkir og vendir heldur hann tað ikki bera til at leypa avstað og keypa nýtt skip, tí tað tekur sína tíð at seta seg inn í øll tey nýggju tryggdarkrøvini. Tey krøvini vil Tumma Arabo kenna út í æsir, áðrenn hann fer at láta landsstýrinum nakað tilmæli.

randi

BLÁDÝPI
bjóðar einstaklingum og bólkum gott og bíligt innivist
- á sumri og á vetri!
Dr. Jakobsensgøta 14-16
Tel: 11951 Fax: 19451

KOYRI-SKÚLIN BJ
v/ Bjarka Johannesen
Tlf. 14845 ☎ 84745
NÝTT SKEIÐ
til PERSÓNBIL
byrjar mánad. 15.01. kl. 16.30
til STÓRU KOYRIKORTINI
byrjar týsd. 16.01. kl. 19
til MOTORSÚKKLU
byrjar mikud. 17.01. kl. 19
Tlf. 14845 - 84745
Um vikuskiftini eisini
Tlf. 56907






Pizzaria
Tlf. 18866
TILBOÐ HESA VIKUNA
bert 55,–

## Vestfalskyrrindi

**28. desember:** Fyrra kvarter
**5. januar:** Fullmáni/Mánin longst frá jørðini

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Nólsoyar-fjørði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 jan | 0655 | 1915 | 0855 | 2115 | 0510 | 1730 | 0710 | 1930 | 0555 | 1815 | 0610 | 1830 |
| 7 jan | 0736 | 1955 | 0936 | 2155 | 0551 | 1815 | 0751 | 2010 | 0636 | 1855 | 0651 | 1910 |
| 8 jan | 0815 | 2035 | 1015 | 2235 | 0630 | 1850 | 0830 | 2050 | 0715 | 1935 | 0730 | 1950 |
| 9 jan | 0855 | 2115 | 1055 | 2315 | 0710 | 1930 | 0910 | 2130 | 0755 | 2015 | 0810 | 2030 |